# Ítróttarblaðið

## Ítróttartoymið á Sosialinum:


Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo


Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo


Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo


Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo


Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo

## Eli Hentze gjørdi comeback

40 ára gamli Eli Hentze spældi aftur í B71-troyggjuni og bestu føroysku fótbóltsdeildini leygardagin. Hann loysti Høgna Midjord av miðskeiðis í seinna hálvleiki, tá B71 tapti 3-0 móti ÍF í Fuglafirði. Aftaná kappingarendan í 2007 boðaði Eli Hentze frá, at hann tók seg av ovastu rók sum fótbóltsspælari. Í 2008 stjórnaði hann besta mansliðnum hjá B71, og í fjør loysti hann Frankie Jensen av, tá felagið úr Sandoynni flutti upp í bestu deildina. Nú gjørdi hann comeback sum spælari.

uni@sosialurin.fo



**»** Latið viðhaldsfókini, sum elska felagið so nógv, taka yvir. Latið okkum verða ein partur av loysnini

JAMES MCKENNA, FORMAÐUR Í SPIRIT OF SHANKLY, FJEPPARAFELAG HJÁ LIVERPOOL



**»** Tað var eingin ynskibyrjan, eg fekk. Eg byrjaði dystin á beinkinum. Tað var ein steypakappingardystur, men eg kom so inn, kiksaði servuna og varð tikin út aftur

JÓHAN PETUR Á STONGUM

# IM-Normur til Olaf Berg

**TALV** Frálíku avrikini hjá Olafi Berg, føroyameistara, á Talvolympiaduni í Russland hevur við sær ein IM-norm



*Olaf Berg*

Uni Holm Johannesen

Tað var staðfest við javnleikinum móti GM Jose Garcia Gonzalez, stórmeistari (2543), úr Meksiko.

Sannlíkindi fyri, at tað eydnaðist hesaferð vóru ikki serliga stór, tí ein stórmeistari sat yvir av Olafi Berg.

Føroyingurin vísti hinvegin dirvi og fekk ein trivaligan javnleik.

2010 hevur eydnaðist væl hjá honum. Fyrr í ár vann hann føroyameistaraheitið, og nú er IM-normur komin til høldar.

uni@sosialurin.fo

## Miðlarnir skriva...

*» Øði kom í grindina eftir at Milan Kulic hevði gjørt ófantaligt fríspark á miðjum vølli. Sum rætt var, fekk hann gula kortið, men NSÍ-leikari slapp órevsaður at blaka Vagn Mohr Mortensen um koll. Eyðvita valdi dómarin diplomat linjuna.<<*

**• Heimasíðan hjá HB um dystin móti NSÍ**

*>>Tað var einki reiðiligt vongspæl í dag, og tað kann undra, hví so nógv av spælinum var um miðuna, tá vit eru smávaksnir, meðan neistarnir eru væl hægri. Hetta er helst nakað, sum vit mugu gerast nógv meiri tilvitaðir um<<*

**• Heimasíðan hjá H71 um dystin móti Neistanum**

*>>Fimm mál frá fimm ymsum leikarum og einki gult kort ber boð um, at vit í dag lótu alt upp til fótbóltsspælið, og tá ið tað nú eydnaðist somikið væl, so var ongantíð nakar ivi um úrslitið. Ein greiður og væl uppiborin 5-0-stórsigur.<<*

**• Heimasíðan hjá B36 um dystin móti AB**

*>>Eg eri ongantíð nøgdur at tapa. Og at tapa við níggju málum er als ikki nøktandi.<<*

**• Petur M. Petersen, annar av venjarunum hjá H71, í viðtalu við neistin.fo**

## Klumman:

# Væl afturkomin KÍ!

Tróndur Arge

Eitt tað søguríkasta fótbóltsfelagið í landinum er aftur í bestu deildini og vit hava saknað tykkum. Tað eru nokk ikki allir havnarmenn, ið vilja viðurkenna tað, men føroyskur fótbóltur er ikki tað sama uttan KÍ. Tað hevur altíð verið ein serlig kapping millum havnarmenn og klaksvíksingar, eins og tað er millum HB og KÍ. Tvey feløg, sum hava vunnið 38 føroyameistaraheiti millum sín, og hava mangan góðan leikara uppælt.

KÍ hevði kanska gott av at fara ein túr í næstbestu deildina, fyri at rudda út og upp í felagnum. Sum skilst, so er felagið skuldafrítt aftur og klárt er at leggja til brots í bestu deildini enn eina ferð. KÍ hevur eina ríka søgu og tosað verður enn um millum annað 66' liðið, men nú er KÍ komi undan á nýggjum. Tí má søgan ikki tyngja teir ungu, sum komandi ár skuldu stríðast í bláu og hvítu KÍ-troyggjuna. Tað skal ikki skiljast so, at klaksvíksingar ikki skulu verða stoltir av søguni, men hvat KÍ megnaði fyrr, skal ikki seta støðið fyri teir ungu í dag.

Vónandi megnar KÍ at arbeiða við eini langtíðar ætlan, sum kann skapa eitt kappingarført KÍ lið, ið kann bjóða av í oddinum í føroyskum fótbólti í framtíðini. Klaksvík og KÍ er alt ov stórt til ikki at vera ein partur av bestu deildini í føroyskum fótbólti.

trondur@sosialurin.fo



*Komandi ár skal KÍ aftur leika landskappingardystir móti besta liðnum hjá javnaldranum úr HB*

Mynd: Álvur Haraldsen